**9.a flokkur**
**Eysturskúlin**
**Tórshavn**

Ungdómstingið

**Ungdómstingmál nr. 4/2014: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu** (prutl)

**Uppskot**
**til**
**løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ferðslu**
(prutl)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 65 frá 9. september 1963 um ferðslu, sum kunngjørd við løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 36 frá 30. apríl 2012, verður gjørd henda broyting:

Í § 18, stk. 3 verður "16" broytt til: "15".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

**Viðmerkingar:**

Uppskotið snýr seg um at broyta aldursmarkið á teimum, ið kunnu taka koyrikort til prutl. úr 16 árum til 15 ár.

Longu sum 15 ára gomul – og kanska enn fyrr – hugsa ung um at fáa koyrikort til prutl. Tey vilja kanska royna at koyra prutl, áðrenn koyrikortið er komið í hús. Hetta kann hava óhepnar avleiðingar, og kann elva til fleiri óhapp. Ein háttur at fyribyrgja hesum kundi verið at givið frálæru til koyrikort til prutl, longu tá tey ungu nærkast 15 ára aldri.

**Á Ungdómstingi, 10. februar 2014**

Laila Neshamar    Kristina Á. Jakobsen    Elin Kristina Christiansen

Jóhan S. Dahl    Johan Hofgaard    Heimi Edvardsson